Janus Petersen, Føroya Banki:

# Hvør av øðrum læra kann




*Janus Petersen, bankastjóri og Bergur Poulsen frá Havsbrún vitja indiska sildamjølsverksmiðju*

**– India er sera samansett, tað er bæði eitt menningarland og eitt ómetaliga ríkt land. Tað kann læra okkum sera nógv um kunningartøkni, meðan vit kunnu geva teimum nógv á fiskivinnuøkinum. Vit kunnu m.a. vera við til at troyta fiskastovnar á djúpum vatni sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, sum er sera væl nøgdur við ferðina í India**

**INDIAFERÐ**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Henda ferð hevur bara sannført meg um, at tað var røtt avgerð at velja India, nú tá so nógvir føroyskir vinnulívsmenn skuldu fáa eitt innlit í, hvussu altjóðagerðin fer fram. Hetta er eitt land, sum lutvíst hevur heilt fitt av møguleikum fyri samstarvi millum føroyskar fyritøkur og indiskar, her ikki minst á fiskivinnuøkinum sigur ein vælnøgdur bankastjóri eftir at hava ferðast til fimm býir í India seinastu 12 dagarnar.

Janus Petersen sær sera stórar møguleikar fyri fiskivinnusamstarvi: – Her er ikki bert talan um fiskaframleiðslu á landi men so sanniliga eisini innan fiskiskap. Tað er heilt spennandi. India hevur eitt sera stórt havøki, sum ikki er serliga væl troytt. Fiskivinnan er enn á einum byrjunarstøði, har tað mest verður fiskað við smærri førum á tí grunna vatninum, meðan djúpa vatnið er lítið troytt. So her eru avgjørt møguleikar fyri føroyska fiskivinnu. Tað er greitt, at fiskivinnan í India er á einum sera lágum triðjalands støði, og vóru indarar eisini sera áhugaðir fyri gongdini á fiskivinnuøkinum í Føroyum, tí teir m.a. hava sera vánalig amboð. Her hava vit veruliga møguleikar eisini at læra indarar nakað. So altjóðagerðin gongur báðar vegir.

Men tað eru eisini møguleikar at gera íløgur í India. Alt fleiri gera íløgur í indiskt vinnulív, sum er í stórum vøkstri. Tískil veksur børsurin eisini við tí rúkandi ferð, og fyritøkurnar hava eina sera góða inntjening. So her er talan um ein búskap, sum er í stórum vøkstri. Janus Petersen sigur, at hetta økið er nakað, sum bankin fer at hyggja nærri at.

Undir vitjanini vóru Janus Petersen og Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún eisini úti og vitjaðu eina sildamjølsverksmiðju. Hon var sera primitiv og var hon eitt gott dømi um, hvussu stórt gapið er millum fiskivinnu í India og so í Føroyum. So tað er nógv vit í Føroyum eisini kunnu læra indarar. Men á nógvum øðrum økjum er India so nógv nógv frammanfyri okkum og onnur lond, her serstakliga innan kunningartøkni, ráðgevaratænastur og bilídnað. Kenslan tú hevur eftir slíka ferð er, at India er eitt sera samansett land. Tað er bæði eitt menningarland og eitt ógvuliga ríkt land. Og hetta kann vera ein sera góð kombinatión, tá Føroyar vil knýta sambond er vera partur av altjóðagerðini sigur stjórin í Føroya Banka.

## Tjaldur møguliga gera íløgur í India

**INDIAFERÐ**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Hetta hevur verið ein sera áhugaverdur og gevandi túrur. Tað tú hevur hoyrt og lisið um, verður nógv meira ítøkiligt, tá tú sjálvur kanst vitja eitt land sum India og har tú sær, hvussu altjóðagerðin virkar í verki. Hetta sigur Líggjas í Bø, nevndarformaður í íløgufelagnum Tjaldur, sum var partur av føroyska ferðalagnum í India. Líggjas í Bø heldur India verða rættað plássið at vitja, skulu vit gera okkum tankar um at vera við í altjóðagerðini. Hann heldur ferðina vera sera væl fyrireikaða.

*Men hvat kann Tjaldur brúka henda túrin til?*

– Tað vil tíðin vísa, men tað er als ikki óhugsandi, at Tjaldur fer at gera íløgur í India.

## Indiskur áhugi fyri Føroyum sum ferðamannaland

**Føroyska vitjanin í India hevur skapt áhuga fyri Føroyum sum ferðavinnuland. Hesin fyrispurningurin kom í gjár til Sámal Bláhamar hjá Toru Tourist:**

*Dear Sir*

*I am H.G. mailing from India. Recently Faroe Prime Minister had visited India, and thus we came to know about This Island in Europe. I am operating a reputed tour company in India. By hearing about Faroe, I am really interested in Visiting the Island, as tourist, and study more about the island. Kindly let me know the Visa formalities to enter the country, and different options of accommodations to stay there for a couple of months. We are interested in establishing some business tie-ups too.*

*Expecting an earlier reply from your end.*

*Thanks & regards*

*H. G.*

Hesin harra H G vísir á, at í sambandi við at føroyski forsætisráðharrin hevur vitjað India frætti hann um hetta oyggjalandið í Europa. Hann stendur fyri eini ferðaskrivstovu og eftir at hava hoyrt um Føroyar vil hann fegin koma henda vegin. Hann vil eisini menna handilssamstarv.